# Frágreiðing um virksemið hjá norðurlendska felagsskapinum Regnhlíf

Á heysti 2006 var fyrsti fundur um at seta ein paraplyfelagsskap fyri norðurlendskar barna – og ungdómsbókarithøvundar á stovn. Hesin fundur var í JokkMokk í norður Svørríki í samband við at NFOR hevði ársfund har tað árið. Felagsskapurin varð tó ikki alment settur á stovn fyrr enn ári eftir á Bókamessuni í Gøteborg í 2007, har ið navnið Regnhlíf varð valt. Sett var tá ein trýmannanevnd at standa fyri felagsskapinum, tey trý í stýrinum vóru úr Noregi, Finlandi og Svørríki . Umframt hetta vórðu tvey umboð úr hvørjum norðanlandi vald at sita í umboðsnevndini. Dánial Hoydal og Marjun S. Kjelnæs vórðu vald í umboðsnevndina fyri Føroyar. Ári ð eftir í 2008, varð ein heimasíða gjørd, og limirnir í nevndini hittust aftur á bókamessuni í Gøteborg, har tey høvdu ein bás við barna- og ungdómsbókum úr øllum norðanlondunum. Regnhlíf skipaði harafturat í 2009 fyri einum skeiðið á Biskops Arnø fyri barna- og ungdómsbókarithøvundar. Ógvuliga strilti gekk við at fáa játta pening til tiltøk frá grunnum, og so smátt datt virksemi hjá Regnhlíf niður fyri. Seinastu innleggini á heimasíðuni (sum skuldi knýta tættari samband millum limalondini) eru frá 2010, og hetta farna ári hevur einki verið at frætta frá limunum í stýrinum.

Tórshavn 15.mars 2012

Marjun S. Kjelnæs